# Eingin avgerð tikin í býráðnum um økið til Mentanarhúsið í Runavík

**- Eg haldi, tað er ógvuliga óheppið, at Mentanarhúsfelagið fer í bløðini og sigur, at Mentanarhúsið ætlandi verður bygt millum verandi skúla og húsini hjá Meinhardi. Málið er sum so ikki viðgjørt í býráðnum, og enn minni er nøkur endalig avgerð tikin, sigur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevndini**

MENTANARHÚSIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Ætlaða skúlabyggingin og byggingin av mentanarhúsi eru tvey fullkomiliga atskild projekt, sigur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevnd Runavíkar býráðs*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Formaðurin í mentanarnevnd Runavíkar býráðs er ikki nøgdur við umrøðuna, sum herfyri var um ætlaða mentanarhúsið í Runavíkar kommunu.

- Eg haldi, tað er ógvuliga óheppið, soleiðis sum málið varð framborið av formanni og nevndarlimi í Mentanarhúsfelagnum. Fólk hava fingið ta fatan, at málið um umtalaða økið í Runavík longu er avgreitt í býráðnum, men soleiðis er tað ikki. Tað er rætt, at arbeitt verður við eini ætlan í Runavík, og býráðið hevur í hesum sambandi fingið eitt skitsuprojekt frá felagnum. Men enn hevur eingin verulig viðgerð av málinum verið í býráðnum, og enn minni hevur býráðið tikið nakra endaliga avgerð, leggur Hans Petur Ellingsgaard, formaður í mentanarnevndini, dent á.

## Alt ov tíðliga

Hann vísir á, at ætlaða mentanarhúsið er eitt mál, sum byrjaði fyri langari tíð síðan.

- Vit, sum sita í býráðnum í dag, fóru í holt við at royna at finna eina loysn, men tað hevur víst seg at vera torført. Í seinastuni hevur verið tosað um, at húsið møguliga kann byggjast í Runavík, men eg vil leggja dent á, at enn er langt á mál. Tí kom tað dátt við, tá ið formaður og nevndarlimur í felagnum longu nú alment vísa á, at mentanarhúsið helst verður bygd millum skúlan í Runavík og húsini hjá Meinhardi.

Hans Petur heldur, at Mentanarhúsfelagið í hesum førinum var alt ov tíðliga á sjóvarfallinum.

- Gamalt er, at vit ikki eiga at kanna okkum skinnið, fyrr enn bjørnin er skotin, sigur hann.

Formaðurin í mentanarnevndini heldur tað vera skiljandi, at tey fólk, sum búgva á økinum við Runavíkar skúla, gerast illa við, tá ið slík tíðindi vera borin alment.

- Sjálvandi skulu tey, sum í mong ár hava búð á hesum øki, takast við uppá ráð, um so verður, at ætlanin gerst veruleiki, sigur Hans Petur.

## Skúlabygging

- Í mentanarnevndini hevur verið arbeitt við eini skúlabygging, og mangt bendir á, at hon verður í Runavík. Hugsað hevur verið um, at verður mentanarhús bygt nærindis skúlanum, hevði kanska verið møguligt at brúkt onkrar fasilitetir í mentanarhúsinum til skúlan, soleiðis at sleppast kundi undan dupultum íløgum.

Hans Petur leggur tó dent á, at skúlabyggingin er eitt mál hjá Runavíkar býráði og mentanarhúsið eitt mál hjá Mentanarhúsfelagnum.

- Hetta eru annars tvey fullkomiliga atskild projekt, har býráðið annars einki hevur við mentanarhúsið at gera.

Formaðurin í mentanarnevndini sigur, at hetta eru alt spurningar, sum býráðið fer at viðgera, og enn er ov tíðliga at siga nakað um, hvat endaliga úrslitið verður.

- Kommunan eigur ein part av hesum øki, men ikki alt, sigur Hans Petur Ellingsgaard at enda.



*- Sjálvandi skulu tey, sum í mong ár hava búð á hesum øki, takast við uppá ráð, um so verður, at ætlanin við mentanarhúsinum gerst veruleiki, sigur Hans Petur Ellingsgaard*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Norðmenn fita igulker og krabbar

**Igulkeravinna í Føroyum doyði í føðingini, og krabbavinnan er enn so nýggj, at torført er at spáa um útlitini**

ALTERNATIV VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Hóast føroyska krabbavinnan er nýggj, er hon longu á einum vegamóti*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Í Føroyum hava vit gjørt royndir at virka eftirspurdar vørur burtur úr igulkerum, og vit hava eisini gjørt royndir at veiða og virka krabba.

Ivaleyst kundu heilar bøkur verið skrivaðar um hesar royndir, men tað stutta av tí langa er, at veiðan og virkingin av igulkerum vardi stutt.

Undir samfelagskreppuni í Føroyum, sum var í hæddini fyri góðum 10 árum síðan, vóru mong alternativ til verandi vinnu frammi, og hugskotini vóru mong.

Tað er tungt at leggja lunnar undir nýggjar vinnur, og tá serliga í krepputíðum, tá ið fíggingarmøguleikarnir eru smáir, og móttloysið kann vera stórt.

Lættast er at veiða og virka tað, vit eru von við, og lukkutíð fyri okkum føroyingar kom toskurin, sum var burtur nøkur ár, aftur í stórum tali – næstan áðrenn vit fingu vent okkum!

Okkara vinnulív stendur á fáum beinum, og tí verða royndir av og á gjørdar at fjøltátta vinnulívið - eisini innan sjóvinnun og veiði.

Við igulkerunum gekst ikki so væl og krabbavinnan, sum lunnar rættiliga vórðu lagdir undir í summar, er longu á einum vegamóti. Krabbi er at fáa undir Føroyum, men líkt er ikki til, at tað í løtuni loysir seg at virka hann uppi á landi. Hugsandi er, at úrslitið hevði verið heilt øðrvísi, um virkingin fór fram umborð á einum lutfalsliga bíligum verksmiðjuskipi.

Bæði fiskur, skelja- og krabbadýr eru skiftandi í fiti – alt eftir árstíðini, og hetta er ikki minst galdandi fyri igulker og krabba.

Í Noregi eru teir á ávísum økjum komnir longur enn vit við alternativari veiði og loysn av ymiskum trupulleikum í hesum sambandi. Har hava teir gjørt royndir við at fita igulker og krabbar í tíðini, hesi skelja-og krabbadýr eru rak. So langt eru vit ikki komnir enn. Okkara igulkeravinna doyði í føðingini, og krabbavinnan er enn so nýggj, at torført er at spáa um útlit og framtíð.

Hóast tað er so nógv lættari at fáast við tað, vit vita ber til, er gott, at vit eiga fólk, sum vilja ganga nýggjar leiðir.



# Madonnu gevur næstu bókina út

**Peabody og súreplini eitur onnur myndabókin til børn, sum Madonna hevur skrivað. Bókin er um, hvussu stórt vald orð hava, og hvussu tey kunnu særa onnur**

BÓKAÚTGÁVA
*ingi@sosialurin.fo*

»Hugskot til hesa bók fekk eg frá einari næstan 300 ára gamlari søgu, sum Kabbalahlærari mín segði mær. Eg hevði hana í huganum leingi, og tá ið eg fór at skriva barnabøkur, gjørdi eg av at brúka sama boðskap í einari av mínum søgum. Hon er um, hvussu stórt vald orð hava. Og um hvussu varin vit mugu vera, tá ið vit tosa, fyri ikki at skaða onnur.«

Soleiðis sigur Madonna um sína næstu myndabók, Peabody og súreplini, sum í hesum døgum kemur í bókhandlar kring allan knøttin. Bókin kemur út á 37 málum, eisini føroyskum, og verður til keyps í 110 londum. Anna Maria R. Jensen hevur týtt Peabody og súreplini til føroyskt.

Madonna ognar øllum lærarum kring um allan heim sína næstu barnabók. Hon sigur, at Baal Shem Tow, »Master of the Good Name«, sum skrivaði upprunaligu bókina, var eisini ein frálíkur lærari. Hann varð føddur umleið 1700 í Podolia-økinum í Ukraina, og vígdi sítt lív til at undirvísa og hjálpa.

»Hann helt tað vera til onga nyttu at vera trúgvandi bara av gomlum vana, men mælti fólki til at skilja tað andaliga. Millum tað nógva, hann lærdi onnur, legði hann stóran dent á, hvussu týdningarmikið tað er at kenna kærleika til onnur menniskju,« sigur Madonna og vísir harvið, at hennara bøkur eru ógvuliga moralskar.

Madonna hevur boðað frá, at hon gevur fimm bøkur út í røðini. Fyrsta bókin kom út 15. september í París, har m.a. Sosialurin var til staðar saman við allari heimspressuni. Síðan er hon farin sanna sigursferð um allan heimin. Hon varð útseld eftir stuttari tíð nógvastaðni og er tískil prentað uppaftur. Í Føroyum eru umleið helvtin av teimum 1000 eintøkunum seld, og Bókadeild Føroya lærarafelags sigur, at hon ikki verður uppafturprentað. Tí gerast hetta bøkur, ið eru verdar at savna.

Tær eru sjáldsama vakrar, og hvørja ferð er bókin myndprýdd við einum nýggjum listafólki. Hesaferð hevur Loren Long myndprýtt, og stílurin er ein heilt annar enn í fyrstu bókini, ið kallast Ensku rósurnar. Hann býr í Cincinnati í Ohio saman við konu sínari og tveimum synum. Hann hevur undirvíst í tekning, og verk hansara eru í nógvum útgávum, m.a. Sports Illustrated og Time magazine. Hann er íðin baseballfjeppari og spældi sjálvur í fleiri ár á einum baseballliði. Tað sæst aftur í bókini.

Skuldi nakar ivast, so hevur Madonna givið 16 tónleikaverk út og spælt við í 18 filmum. Eitt nú Evita. Peabody er 32 síður og kostar 120 krónur í bókabúðunum.




*Loren Long hevur myndprýtt Peabody og súreplini eftir Madonnu*

# Menniskjusonurin sum teknirøð

**Eitt meistaraverk. Minni kann ikki sigast um bókina »Menniskjusonurin«. Talan er um nakað so sjáldsamt sum eina teknirøð á føroyskum, ið setir hendingar í Nýggja testamenti á pall. Peter Madsen teknaði og skrivaði, og tað borgar fyri góðsku**

BÓKAÚTGÁVA
*Ingi Rasmussen*
*ingi@sosialurin.fo*




*Menniskjusonurin eftir Peter Madsen er eitt meistaraverk. Nú á føroyskum*

Tey flestu kenna søgurnar um Valhalla og Quark. Teknirøðirnar, sum eisini eru týddar til føroyskt. Bøkurnar góvu fólkum innlit í Norðurlendsku gudalæruna, ið ráddi í gomlum døgum.

Nú hevur kristna læran fingið eina minst líka flott teknirøð. Maðurin, sum teknaði Valhalla, Peter Madsen, hevur gjørt eina fantastiska teknirøð við heitinum »Menniskjusonurin«. Hon er júst útkomin á føroyskum. Heri Tróndheim týddi donsku útgávuna frá 1995 til føroyskt. Danska útgávan hevur selt í meira enn 65.000 eintøkum, og hon er millum annað týdd til franskt. Føroyska útgávan er komin í lag eftir ynski frá Bíbliufelagnum, har Bergur D. Joensen, prestur, er formaður.

Lat tað vera sagt beinanvegin. Hetta líkist als ikki teimum heldur keðiligu, bíbilsku myndabókunum, sum við sínum yvirpedagogiska endamáli súgva allan dramatikk og spenning úr søgunum.

Tvørturímóti. Talan er um eitt meistaraverk, og listarliga støðið er høgt. Ljósið, eygnabráðini og vinklarnir eru so spennandi, at tú kennir teg til staðar. Tað er næstan sum at síggja ein film, ið er í ætt við fantasy-sjangruna, sum er so nógv frammi í dag. Einki er spart.

## Samanskrivað søga

»Menniskjusonurin« er ikki ein teknirøð yvir alla Bíbliuna. Teknirøðin er grundað á tey fýra evangeliini í Nýggja testamenti skrivað saman í eina søgu. Søgan byrjar og endar við krossinum á Golgata. Á fyrstu síðu er krossurin svartur. Á síðstu síðuni er krossurin hvítur og skaptur av útrættu ørmunum hjá Jesusi, tá hann sigur sínum lærusveinum farvæl.

Søgan verður søgd av Pæturi apostli. Hann er tann menniskjaliga tilgongdin til søguna. Pætur lænir okkum eyguni at síggja tær hjartanemandi og skakandi hendingarnar í Jesu lívi. Hann er útvaldur til at siga frá, so at útsøgn irnar hjá Jesusi kunnu koma so tætt orðaljóðinum í Bíbliuni sum tilber.

Grafiskt er munur á tí, sum Jesus og Pætur siga, og Pætur gevur eisini sínar viðmerkingar til tað, sum hendir. Soleiðis ber til, at teknirøðin er trúgv ímóti Bíbliuni, og kortini er tónin gerandisligur.

## Filmisk teknirøð

Hóast nokk so nógvur tekstur er í teknirøðini, so hevði hann ikki megnað at staðið einsamallur. Í hesum liggur nakað av tí, sum ger, at teknirøðin líkist einum filmi. Javnvág er funnin millum mynd og tekst, so tað eru myndirnar, sum bera frásøgnina á mál.

Teknarin hevur við ljósi, skuggum og symbolum skapt ávíst huglag til tær ymisku hendingarnar, so tú uttan at vita av tí, verður ávirkaður. Tú følir og tulkar. Hetta er sama kynstur, sum filmurin ger sær dælt av, og tað kemur teknarin væl frá. Rúmd er fyri, at tú hugsar sjálvur, og onkuntíð er tað næstan, sum tónleikur liggur undir.

## Ikki fyri smábørn

Onkustaðni flýtir blóðið, og yvirhøvur kann sigast, at »Menniskjusonurin« er ikki fyri veikar sálir ella smábørn. Sjálvur hevur Peter Madsen sagt, at teknirøðin er fyri børn frá fermingaraldri og uppeftir.

Tað ónda og døkka hevur eisini fingið sítt pláss eins og tað hevur í Bíbliuni. Tað góða kemur á hendan hátt betri til sjóndar, tí uttan tað ónda er tað góða ikki til. Illimaður ella Satan er avmyndaður sum ein avskeplaður Jesus, og tað kann tykjast eitt sindur ørkymlandi. Helst vísir tað, at tað ónda og góða er ein partur av okkum øllum, og tess fleiri freistingum, Jesus stendur ímóti, tess veikari gerst illimaður.

»Menniskjusonurin« er 163 síður. Bíbliufelagið gevur út, og bókin fæst til keyps í bókabúðunum fyri 150 krónur.